# Javnbjóðis samstarvsavtala
# millum
# Sørvágs- og Vága Kommunu um skipan av heimatænastu í Vágum

## § 1
## Heimild

Henda samstarvsavtala er gjørd við heimild og støði í niðanfyri nevndu lógum:
Løgtingslóg nr. 19 frá 07. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (LL19).
Løgtingslóg nr. 20 frá 07. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (LL20).
Løgtingslóg nr. 31 frá 14. apríl 2014 um ávís starvsfólkaviðurskifti, tá heimatænastan, eldrarøktin v.m. verða løgd til kommunur at umsita (LL31).

## §2
## Samstarvsøki

Samstarvsøkið er við heimild í LL20 § 4 stk. 4-5 skipað millum Sørvágs- og Vága kommunu.

## §3
## Heiti á samstarvinum

Samstarvið fær heitið "Heimatænastan í Vágum".

## §4
## Slag av samstarvi

Samstarvsavtalan verður skipað sum javnbjóðis samstarv sambært LL20 §6 og 7.

## §5
## Endamál við samstarvinum

Endamálið við samstarvinum er, at kommunurnar í samstarvsøkinum røkja heimatænastu og eldrarøkt v.m. í felag, soleiðis at borgarin fær boðið eina samskipaða heildartænastu smbr. LL19 §1, stk. 1

Stk. 2.
Allir borgarar í samstarvsøkinum hava eftir tørvi rætt til tær tænastur og tilboð, sum samstarvið bjóðar.

## §6

## Stýrið

Fyri samstarvið velja kommunurnar eitt stýri sambært LL20 §7 stk. 1-3. Sambært LL20 §7 stk. 4 velja kommunurnar stýrið sum skjótast eftir, at samstarvsavtalan er góðkend av landsstýrismanninum og annars eftir hvørt kommunuval, galdandi fyri valskeiðið.

Stk. 2.

Stýrið skipar seg sjálvt við øðrum borgarstjóranum sum formanni og hinum sum næstformanni. Í hvørjum valskeiði gongur formaðurin upp á skift millum kommunurnar. Hvør kommuna hevur formannin 2 ár um ferðina.

Stk. 3.

Leiðarin fyri samstarvið er skrivari hjá stýrinum, ella útvegar hann annan skrivara. Skrivarin hevur ikki atkvøðurætt. Eftir hvønn stýrisfund sendir stýrisformaðurin stýrislimunum í samstarvinum fundarfrágreiðing seinast tríggjar yrkadagar eftir fundin.

Stk. 4.

Stýrið hevur regluligan fund hvønn ársfjórðing. Fundirnir verða ásettir fyri eitt ár í senn. Stýrið kann samtykkja at hava eyka fund eftir tørvi, ella eftir áheitan frá 2 stýrislimum.

Stk. 5.

Miðað verður ímóti, at avgerðir hjá stýrinum vera tiknar í semju. Annars vera avgerðir í stýrinum tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er tað atkvøðan hjá stýrisformanninum, sum er avgerandi.

Stk. 6.

Um limi berst frá at møta, skal varalimur altíð vera tilkallaður. Stýrið er bert viðtøkuført, tá tað er fullmannað. Eingin fundur verður hildin, um ikki antin formaðurin ella næstformaðurin kunna møta.

Stk. 7.

Stýrislimir, sum ikki eru borgarstjórar, fáa samsýning fyri hvønn stýrisfund, har teir luttaka sambært galdandi reglum um samsýning til kommunustýrislimir. Víst verður til LL20 §7 stk.5. Skrivarin fær samsýning fyri hvønn fund, um so er, at fundurin verður hildin uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Samsýningin verður sambært §9 í kunngerð nr. 92 frá 28. juni 2013 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

## § 7

## Dagligt umsiting og staðseting

Leiðarin hevur fíggjarligu, umsitingarligu, starvsfólkaligu og fakligu ábyrgdina av virkseminum hjá samstarvinum við tilvísing til stýrið. Dagliga umsitingin verður skipað á Sýnini. Verandi telduskipanir, vaktarætlan (prolog) og 3V visitatiónsskipan eins og búskaparskipan landsins vera nýttar.

Stk. 2.

Stýrið ger nærri starvsskipan fyri arbeiðið hjá stýri og leiðara.

Stk. 3.

Dagliga arbeiðsplássið hjá leiðaranum er á Sýnini, har eisini stýrið heldur fundir sínar.

## §8

## Leiðslubygnaður – setanarmynduleiki

Leiðsla og ábyrgd av Heimatænastuni í Vágum – er sambært niðanfyri standandi leiðslubygnaði:

- Stýrið - valt av kommunum í samstarvinum
- Stýrisformaðurin - valdur av stýrinum
- Leiðarin í Heimatænastuni - settur/loystur úr starvi av stýrinum.
- Stýrið kann geva leiðaranum heimild at seta/loysa úr starvi onnur starvsfólk í Heimatænastuni.

Stk. 2.

Fyrsta uppgávan hjá leiðaranum verður at endurskoða verandi bygna fyri Heimatænastuna, og koma við tilmæli til stýrið um møguligar broytingar av bygnaðinum og lýsa tænastuveitingarnar í sambandi við yvirtøkuna av økinum.

## §9

## Ognarviðurskifti

Ognirnar hjá samstarvinum eru býttar millum kommunurnar sambært lutfallinum av fólkatalinum pr. 31. desember 2013 ávikavist Vága kommuna 1.963/Sørvágs kommuna 1.096 sambært avtalu millum Sjálvsognarstovnin heimið á Sýnini, Vága kommunu, Sørvágs kommunu, Almannamálaráðið og Fíggjarmálaráðið dagfest 06/01-2014 og seinni góðkent av Almannamálaráðnum og stýrinum fyri sjálvsognarstovnin

## § 10

## Løgur

Nýíløgur og útbyggingar. skulu vera samtyktar av báðum kommunustýrunum í samstarvinum. Àbyrgdin av viðlíkahaldinum liggur hjá samstarvinum.

## §11

## Visitatión/upptøka

Visiterað verður til allar tænastur og veitingar, sum veittar vera sambært LL.19.

Stk. 2.

Visitatión verður skipað við fakligari visitatiónseind, sum verður mannað við hóskandi fakligum førleikum.

Stk. 3.

Visitatión til tænasturnar verður gjørd skrivliga.

Stk. 4.

Til at viðgera og taka støðu til visitatión um búpláss, umlætting og døgnrehabilitering verður sett ein upptøkunevnd. Í upptøkunevndini eru hesir limir: Leiðarin, kommunulæknin, visitator og økisterapeutur.

Stk. 5.

Leiðarin í Heimatænastuni er formaður í upptøkunevndini. Nevndin kemur til felags niðurstøðu sambært fakligari tørvsmeting. Um tað skuldi hent at semja ikki fæst, tekur leiðarin avgerð.

**Stk. 6.**
Leiðarin tekur avgerð um bráfeingis umlætting og døgnrehabilitering í samráð við upptøkunevndina.

## §12
## Fíggjarviðurskifti

Fíggjarárið hjá samstarvinum er frá 01. januar til 31. desember. Sambært fráboðan Fíggjarmálaráðsins dagfest 16. juni 2014, skal samstarvið hava sjálvstøðugan roknskap, og annars fylgja ásetingunum í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna o.til. Samstarvið nýtir KT-tænasturnar sum landið bjóðar og verða viðurskiftini viðvíkjandi roknskapi og KT-tænastum avtalað nærri í: "Sáttmála um tænastustig av roknskapar- og kt-tænastum millum landi og samstarvið", sí SLA
**Stk. 2.**
Samstarvið ber allar útreiðslur, sum fylgja við at røkja uppgávurnar sambært LL.19 og LL.20. Útreiðslurnar verða sambært LL.20, §10 býttar lutfalsliga millum Vága- og Sørvágs kommunur í mun til tal av borgarum, sum 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri .
**Stk. 3.**
Vísandi til LL.20, §7 stk. 7, skal formaðurin áðrenn 25. august leggja uppskot til fíggjarætlan fyri stýrið, soleiðis at avleidda gjaldið hjá kommunum í samstarvinum samsvarandi LL20 §10 kann takast við í fíggjarætlanarviðgerð teirra.
**Stk. 4.**
Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í síðsta lagi 14 dagar eftir, at kommunurnar í samstarvinum hava samtykt sínar fíggjarætlanir.
**Stk. 5.**
Samstarvið kann sambært LL20 §7 stk. 8 ikki átaka sær nakra eyka útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt og kommunustýrini geva loyvi til tess, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvskommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum fyrstu og aðru viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum.
**Stk. 6.**
Í sambandi við árligu fíggjarætlanina, vera kommunurnar at seta av játtan sambært fíggjarligu uppgerðini, sum tekur støði í undanfarna roknskaparári. Mánaðarligt acontogjald samsvarandi fíggjarætlanini, verður goldið fyri raksturin av Heimatænastuna tann 01. í hvørjum mánaði fyri verandi mánað. Leiðarin skal leggja fíggjarstøðuna fyri stýrisformannin seinast 10. í hvørjum mánaði fyri undanfarna mána. Stýrisformaðurin kunnar beinanvegin hinar nevndarlimirnar um fíggjarstøðuna.

## §13
## Grannskoðan og gjald

Í seinasta lagi í apríl mánaði skal grannskoðaður ársroknskapur fyri árið frammanundan fyrilliggja. Gjaldið frá kommununum fyri farna árið verður tá reguleráð samsvarandi endaligu tølunum.

## §14
## Eftirlit

Eftirlitið verður skipað í millumkommunalum samstarvi eftir kunngerð sambært LL 19 § 19, stk. 3

## §15

## Starvsfólk

Í sambandi við yvirtøkuna av heimatænastu, eldrarøkt v.m. er avtalað við Heimatænastuna í V.E.K.S. at Heimatænastan í Vágum yvirtekur øll starvsfólkini, sum arbeiða í Heimatænastuni í Vágum og økisskrivaran fyri øki 2 smbr. LL 31. Talan er um 73 starvsfólk, 51,8 ársverk tilsamans.

## §16

## Avgerðarrættur

Stýrið hevur evstu ábyrgd og harvið, innan ásettar karmar, avgerðarrættin á økinum heimatænasta, eldrarøkt v.m. og tekur avgerðir vegna kommunurnar í samstarvinum.

## §17

## Gildiskoma

Henda samstarvsavtala fær gildi, so skjótt landsstýrismaðurin hevur góðkent hana.

## §18

## Broytingar og góðkenning

Broytingar í hesari samstarvsavtalu skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

Sørvági, tann 25.06.2014

Sørvágs Kommuna

Sune Jacobsen, borgarstjóri

Sandavági, tann 30.06.2014

Vága Kommuna

Rósa Samuelsen, borgarstjóri